# Føroyingur týðandi starv hjá Statoil

**Í kjalar vørrinum av avgerðini hjá Statoil at flyta sítt leitivirksemi í Føroyum úr London til Stavanger er tað hent, at stjórin hjá Statoil fyri verandi leiting í Føroyum Rúni Hansen, er settur sum ein av ovastu stjórunum í nýggju deildini fyri leiting í Europa**



*Rúni Hansen, stjóri fyri leitingini hjá Statoil í Føroyum er settur sum Business Development Manager fyri allari leiting hjá Statoil í Europa. Hann fer framvegis at hava Føroyaøkið sum part av sínum arbeiði. Her er hann saman við ovasta stjóranum fyri leiting í Europa Yngve Vassmyr og Arnt-Eirik Rørnes, jarðfrøðiliga oddamanninum fyri Føroyaøkið*

*Mynd Jan Müller*

OLJUMESSA
*Jan Müller úr Stavanger*

Fuglfirðingurin Rúni Hansen, stjóri fyri leitideildini hjá Statoil í Føroyum er settur sum fíggjarstjóri fyri nýggja leitipartin hjá Statoil í Europa. Hann man sostatt vera ein tann føroyingur, sum hevur hægsta leiðandi starvið í einum stórum altjóða oljufelag. Rúni Hansen hevur arbeitt hjá Statoil seinastu fimm árini. Fyrst var hann hjá Statoil í Danmark, gjørdi økonomiskt analysuarbeiði í sambandi við leiting hjá Statoil í Grønlandi og danska partinum av Norðsjónum men fór seinni at standa fyri fíggjarleiðslu hjá Statoil á Viðanesi. Men skjótt vórðu boð eftir Rúna í einum øðrum parti av Statoil, nevniliga leitideildini hjá felagnum í Føroyum. Har hevur hann samskipað kanningar og leiting saman við Statoil í London. Nú Statoil hevur broytt bygnaðin og hevur flutt sítt føroyska leitivirksemi úr London til Stavanger.

Eftir turru boringina í Føroyum í fjør tók Rúni Hansen sær av uppgávum fyri Statoil í Noregi eitt skifti men varð síðani sendur til Saudi Arabia og Persaraflógvan at standa fyri eini útbyggingarætlan har. Eftir eitt hálvt ár vóru boð eftir Rúna at fáa hann at vera við til at mynda leiðsluna í nýggja broytta bygnaðinum hjá Statoil í altjóða leiting. Hann skal standa fyri tí meira handilsliga partinum í leiðsluteaminum fyri Europa, herundir standa fyri keypi og sølu av feltum. Heitið er Business Development Manager. Rúni fer at hava fasta arbeiðspláss sítt í Havn, men nú Statoilvirksemi fyri Føroyar verður flutt úr London til Stavanger fer Rúni Hansen at ferðast nógv ímillum. Hann fer eisini at hava fast kontór á Forus høvuðsdeildini hjá Statoil í Stavanger.

Rúni Hansen heldur annars, at tær broytingar, sum eru gjørdar í leiðslubygnaðinum hjá Statoil innan leiting í Europa er eitt tekin um, at Statoil vil varðveita og helst styrkja sítt leitisíðuna á Atlantsmótinum og samskipa hana við alla ta vitan og ekspertisu, sum felagið longu hevur á norskum øki. Nú leitingin fer longur og longur út á djúpt vatn í norskum øki merkir tað eisini, at leitingin og kanningarnar nærkast føroyskum øki. At talan í báðum førum er um djúpt vatn og í nógva staðni á báðum landgrunnunum um øki við tjúkkum basaltflánum, so er skilabest og náttúrligt at samskipa kanningarnar í framtíðini.

-Her skal eitt stórt arbeiði gerast og verður tað sera spennandi, hvussu fer at ganga hjá Amerada Hess hinumegin markið. Tað er ein stór avbjóðing fyri alla leitingina við Føroyar eisini. Men lat okkum ikki seta ov stórar vónir, at nakað skal henda her og nú. Enn kann vera langt á mál.

# ONS og burðardygg menning

OLJUMESSA
*Jan Müller úr Stavanger*

Týsdagin lat upp 15. altjóða oljuráðstevnan og messan í norska oljubýnum Stavanger. Tiltakið er annaðhvørt ár. Annaðhvørt ár er hon í Aberdeen. Meira enn 1000 framsýnarar eru á framsýningini og mett verður, at eini 30.000 fólk vitja messudagarnar. Millum útlendsku fyritøkurnar eru eisini 12 úr Føroyum, sum hava ein felags bás. Tíðini líkt – har bíðað verður eftir nýggjum úrslitum frá leitingini við Føroyar – er føroyskur básurin lítil og avmarkaður. Talið á fólki á básinum er eisini avmarkað, so hetta fer ikki at teljast millum teir dýru framsýningarbásarnar í føroyskum høpi. Oljuvinnufelagið og Atlantic Offshore Base í Runavík stíla fyri tiltakinum, sum annars Menningarstovan hevur staðið fyri øll árini. Kjartan Kristiansen, sum hevur gjørt eitt veldugt arbeiði at selja Føroyar og føroyska vørur og tænastur í eitt mannaminni er hesaferð avloystur av Maluni Johannesen frá Vinnuhúsinum og Lassa Borðoy frá Atlantic Offshore Base.

ONS er ikki bara framsýning av tøkniligum útbúnaði og øðrum við tilknýti til oljuvinnu. Her er eisini ein ráðstevna við fyrilestrum við kendum nøvnum úr nógvum londum, sum luttaka. Høvuðsevnið fyri ONS 2002 er »Energising a new Generation«. Tað er inn at tosa um reint umhvøri og fara eisini tankar til heimsráðstevnuna í Rio um burðardygga menning, tvær ráðstevnur, sum í veruleikanum hava rættiliga tætt tilknýti til hvørja aðra, nú heimsins lond royna at minka um dálkingina, sum stavar frá nýtsluni av kolvetnum. Her er eisini spurningurin um alternativar og varandi orkukeldur av alstórum týdningi, eisini fyri tey stóru oljufeløgini, sum leggja seg meira eftir at gera íløgur í reinar og varandi orkukeldur, herundir sól, vind, hydrogen oa.



# Føroyskar fyritøkur royna at koma á altjóða oljumarknaðin



*Rúni Hansen heldur tað vera skilagott av føroyskum virkjum, sum vilja koma inn á norska marknaðin, at vera við til slíkar messur sum ONS. Tær mugu sjálvar gera eitt arbeiði fyri at koma í samband við fyritøkur, sum arbeiða á norska landgrunninum*

**-Tað skal gerast eitt miðvíst arbeiði skulu føroyskar fyritøkur fáa lut í arbeiðinum, sum stóru oljufeløgini lata undirveitarum. Hetta ber kanska til hjá smærri føroyskum veitarum heldur Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil. Týsdagin fingu fyritøkurnar innlit í, hvussu eitt felag sum Statoil letur undirveitarum arbeiði**

OLJUMESSA
*Jan Müller úr Stavanger*

Fyrrapartin týsdagin vitjaðu føroysku fyritøkurnar, sum eru við á altjóða oljumessuni í Stavanger, á høvuðsborgini hjá Statoil. Oljuvinnufelagið, sum skipar fyri føroysku luttøkuni á ONS saman við Atlantic Offshore Base, kom í samband við føroyska stjóran í Statoil, Rúna Hansen og varð tað hildið vera skilagott at lata tær hoyra nærri um, á hvønn hátt Statoil ger sáttmálar við og brúkar undirveitarar. Hetta er eisini í tráð við føroyska ynski at kunna sleppa inn á útlendska marknaðinum við vørum og tænastum. Føroyingar hittu tí fleiri fólk frá kontraktdeildini hjá Statoil.

Sosialurin skilur á luttakarunum, at teir fingu nógv burtur úr. Rúni Hansen, stjóri sigur, at teir royndu at greiða føroyski fyritøkunum, hvat skal til fyri at koma inn á útlendska marknaðin eitt nú norskt øki.

Men hvørjir eru møguleikarnir hjá føroyingum at koma inn á tann stóra norska marknaðin at kappast við royndar og stórar norskar og altjóða fyritøkur um sáttmálar?

Rúni Hansen sigur, at vit mugu hava bæði beinini á jørðini. Men nú høvdu virkini so møguleika at fáa at vita, hvat skal til. Tað eru einstakir smáir undirveitarar, ið hava møguleika at koma inn á marknaðin. Men tað skal gerast eitt stórt arbeiði. Tað er ikki bara at knipsa við fingrunum og halda, at man er innanfyri. Ætla føroysk virki at fáa lut í teimum sáttmálum, sum verða latin undirveitarum, so skal eitt neyvt miðvíst arbeiði gerast. Og tað er eingin garanti fyri at man fær arbeiði, hóast hetta verður gjørt. Tað er hørð kapping.

Oljufeløg sum Statoil gera oftani avtalur við stórar undirveitarar. So gera teir aftur avtalur við smærri undirveitarar. So Statoil og onnur stór oljufeløg gera fáar sáttmálar við smærri undirveitararnr, sum eitt nú teir føroysku mugu metast at vera.

-Er tað ikki nettupp ein stórur trupulleiki hjá føroyskum veitarum, at oljufeløgini gera bara avtalur við stórar veitarar, sum so aftur hava sínar føstu undirveitarar, sum ikki eru føroyskir!

-Hvat viðvíkur arbeiði í føroyskum øki, so hava vit eina lóggávu, sum sigur, at føroyskir veitarar skulu hava møguleika at bjóða. Hetta er so eisini útviklað meira við skrásetingarlistanum FOIR, har alt skal bjóðast út um hesa elektronisku skráseting. Tað gongur tann rætta vegin, men hetta tekur tíð at venja seg til tað.

Rúni Hansen heldur tað vera skilagott av føroyskum virkjum, sum vilja koma inn á norska marknaðin, at vera við til slíkar messur sum ONS. Tær mugu sjálvar gera eitt arbeiði fyri at koma í samband við fyritøkur, sum arbeiða á norska landgrunninum.

Á kunningarfundinum hjá Statoil kom fram, at hetta er ikki tann besta tíðin fyri útgerðarskip í einum parti av heiminum. Men Sosialurin skilur at eitt virki sum Thor í Hósvík, sum hevur lagt seg eftir hesi vinnu, hevur dugað at finna sínar egnu marknaðir. Thor, sum hevur fleiri oljuútgerðarskip siglandi ymsa staðni í heiminum, hevur júst yvirtikið eitt stórt útgerðarskip í Singapore. Rættiliga nógv skal gerast við skipið, áðrenn tað verður sett í sigling.